## Umvæla skaðan í Skálavík



Hóskvøldið samtykti Skálavíkar kommuna at fara undir at gera havnarlagið í bygdini aftur. Inn vóru komin tvey tilboð og tikið var av tí lægra, ið RTS Contractors hevði upp á slakar seks milliónir krónur Fyrsta stigið verður at gera verandi grótkast aftur og seta eina betongkistu fyri endan og at gera eitt nýtt grótkast, ið fer at ganga norður fyri víkina. - Hetta verður gjørt fyrst og fremst fyri at slíkur skaði ikki hendir aftur, men eisini fyri at verja tað sum er. Sjálvur bátahylurin verður eisini gjørdur djypri og tømdur fyri tey umleið 1.200 kubikkini av sandi og gróti, ið komu inn í hylin í óðnarveðrinum, sigur Linjohn Christiansen, brogarstjóri í Skálavík. Fíggjarliga orkan hjá Skálavíkar kommunu er avmarkað, og verður hetta tí gjørt í stigum. Arbeiðið, ið farið verður undir nú, kostar góðar 3,5 milliónir krónur og tekur sjey mánaðir at gera. - Skálavíkar kommuna vónar, at landið játtar pening av fíggjarlógini í heyst at gera tað arbeiðið, ið eftir er, sigur Linjohn Christiansen, borgarstjóri.

# Akstovan blokerar okkum




*Ongan koyriroyndir og skerd avgreiðslutíð. Tað eru koyrilærarar sera ónøgdir við*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Koyrilærarar eru ógvuliga ónøgdir við viðurskiftini á Akstovuni. Teir duga ikki at skilja, at tað ikki ber til at skipa summarfrítíðina soleiðis, at koyrikønir ikki hava frí í senn**

KOYRIROYND
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Hví ber tað ikki til hjá Akstovuni at skipa summarfrítíðina á ein slíkan hátt, at tað slepst undan at lata stovnin aftur? Tað ber til alla aðra staðni!

Tað siga koyrilærarar, sum Sosialurin hevur tosað við.

Teir eru ógvuliga ónøgdir við Akstovuna, og serliga galið er um summarið, tá summarfrítíðin er fyri.

- Eitt er, at teir velja at lata stovnin aftur fyri koyriroyndum, men teir hava eisini skerdar upplatingartíðir langt inn í august mánað. Fólk, sum kanska kemur langvegis frá av bygd, risikera at koma á stongdar dyr, siga koyrilærararnir.

Tað eru tríggjar vikur, at eingin koyriroynd kann verða, og tað er sera óheppið, halda koyrilærararnir.

- Ung, sum fylla átjan í hesum tíðarskeiði, mugu bíða í vikur fyri at sleppa upp í koyriroynd. Sama er galdandi fyri eitt nú sjómenn, siga teir.

Eitt annað, sum koyrilærararnir eru sera ónøgdir við, er, at tann eini koyrikøni á Akstovuni fær loyvi at arbeiða til klokkan seks mánadag til hósdag, fyri síðani at hava frí fríggjadag.

- Vit verða tí noyddir at hava koyriroyndir heilt til klokkan seks, samstundis sum vit byrja teorilæru klokkan fimm. Hetta er neyðugt, tí ungu fólkini ofta íðka einhvønn ítrótt, og venjingin byrjar oftast um 7-tíðina, siga koyrilærararnir.

### Illa tilrættalagt

Men tað er ikki bara um summarið, at trupulleikarnir eru. Koyrilærararnir halda, at tað er ov vánalig tilrættalegging í síni heild á Akstovuni.

- Teir kunnu finna upp á at senda báðar próvdómararnar út á bygd sama dag, so Havnin liggur heilt lamin. Teir senda annan til Suðuroyar og hin til Norðoyggjar sama dag við tí úrsliti, at eingin próvdómari er í Havn, og tískil ber ikki til at sleppa upp í koyriroynd, siga koyrilærararnir.

Heldur ikki kunningin er nøktandi, halda teir.

- Til dømis lótu teir aftur eina heila viku undan jólum í fjør uttan at vit fingu nakað at vita um tað framman undan. Vit fingu bara at vita, at frá nú av og fram til jóla verða ongar koyriroyndir, siga teir báðir koyrilærararnir.

Teir siga, at tað er serliga óheppið hjá sjómonnum, sum sigla úti. Teir eru kanska ikki nógv heima, og eru ongar koyriroyndir í tríggjar vikur mitt um summarið kunnu teir koma út fyri, at noyðast at útseta koyrikortið í fleiri mánaðir.

Men mest ilskast teir inn á, at teir eru noyddir at hava koyriroyndir til klokkan seks mánadag til hósdag.

- Vit krevja at fáa fríggjadagin aftur, siga teir báðir koyrilærararnir, sum Sosialurin hevur tosað við.



*Jákup Jacobsen, stjóri á Akstovuni, sigur, at summarfrítíðin verður skipað soleiðis av praktiskum orsøkum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Einki nýtt undir sólini

**Soleiðis hevur verið skipað fyri øll tey tíggju árini, eg havi verið stjóri her, og summarfrítíðin er skipað soleiðis av praktiskum orsøkum, sigur Jákup Jacobsen, stjóri á Akstovuni**

KOYRIROYND
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Jákup Jacobsen, stjóri á Akstovuni, skilir als ikki kritikkin, sum koyrilærarar hava.

- Summarfrítíðin hevur altíð verið skipað soleiðis, og tað er gjørt upp á hendan mátan fyri at fáa avviklað summarfrítíðina upp á stytst møguligt tíðarskeið, sigur Jákup Jacobsen.

Hann vísir á, at teir eru ikki ov væl mannaðir, og at tað er trýst á alla tíðina.

- Tænastan, sum koyrilærararnir fáa er ikki verri enn tann tænasta, sum allir aðrir kundan fáa hjá okkum. Alt virksemi verður droslað niður í summarfrítíðar skeiðinum, men tað gongur ikki harðari út yvir koyrilærararnar enn onnur, sigur Jákup Jacobsen.

Hann undrast annars á, at koyrilærararnir ikki koma til hansara at gera vart við sína ónøgd. Ikki tí, tað hevði tó einki nyttað.

- Summarfrítíðin verður løgd soleiðis til rættis fyri at fáa avviklað hana á skynsamiligasta hátt, sigur stjórin á Akstovuni.

Bíðitíðum slepst ikki undan, heldur hann.

- Tað sigur seg sjálvt, at tá tað koma stórir flokkar frá einum tíggju koyrilærarum, so slepst ikki undan bíðitíðum. Men vit royna altíð at avmarka tær, so tær ikki fara upp um tvær vikur, sigur Jákup Jacobsen.

Hann vísir til, at Akstovan hevur sínar reglur og sínar føstu mannagongdir at halda seg til.

- Og teimum mugu vit fylgja, og tá vit hava avgjørt at skipa summarfrítíðina soleiðis sum vit hava, er tað út frá praktiskum orsøkum. Og koyrilærararnir fáa altíð kunning í góðari tíð, sigur Jákup Jacobsen, stjóri á Akstovuni.